almannastovan
almannastovan@almannastovan.fo
www.almannastovan.fo

*Umsóknarfreist er týsdagin 1. apríl 2008. Vinarliga merkið brævbjálvan: " Sosialráðgevar til Økisdeild í Havn"*



# Hevur tú hug til SOSIALT ARBEIÐI

## Almannastovan søkir eftir ráðgevum til Økisdeildina í Havn og í Klaksvík.

Uppgávurnar hjá Almannastovuni eru, við grundarlagi í sosiallóggávuni, at veita persónliga sosiala ráðgeving og vegleiðing, og alment og persónligt at upplýsa um rættindi og skyldur.

Arbeiðs- og ábyrgdarøkið hjá Almannastovuni er at ráðgeva og vegleiða borgarum um rættindi og skyldur viðvíkjandi almannaspurningum, at seta í verk fyriskipanir sambært almannalóggávuni og fíggjarligar veitingar. Hartil skal Almannastovan fáa til vega og greina hagtøl til politiska myndugleikan.

**Førleikakrøv**
Ert tú sosialráðgevi, námsfrøðingur, samfelagsfrøðingur, ella hevur aðra sosiala ella samfelagsliga útbúgving, og hevur tú hug til sosialt arbeiði og vilt vera við til at gera ein mun, so er tað tær vit vilja hava fatur á. Royndir í líknandi arbeiði kunnu vera ein fyrimunur.

**Starvið**
Sum starvsfólk á Almannastovuni hevur tú ein týðandi leiklut yvirfyri borgarum, tá tað snýr seg um at skapa fíggjarliga og sosiala trygd, at fyribyrgja sosialum trupulleikum og at hjálpa, tá ið trupulleikar koma í.

Vit kunnu bjóða eitt starv í einum spennandi umhvørvi í støðugari menning við nógvum og fjølbroyttum avbjóðingum, har møguleiki er fyri persónligari og fakligari menning.

**Lønar- og setanarviðurskifti**
Størvini verða sett og lønt sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Starvsmannafelagið í lønarbólki 6, ella avvarðandi yrkisfelag, um tað fevnir um sáttmálaøkið hjá Almannastovuni.

**Nærri upplýsingar**
Nærri upplýsingar um størvini fáast við at venda sær til Rúna Rasmussen, deildarleiðara, á telefon 35 35 70, ella Jóan Hendrik S. Samuelsen, deildarleiðara í Klaksvík, á telefon 45 72 40.

**Umsókn við avriti av prógvum, CV, v.m. skulu sendast til**
Almannastovuna,
Smyrilsveg 20, Postboks 3096,
110 Tórshavn.

KREA



STARVSLÝSING

## [Endurlýsing] Avloysari fyri kunningarfólk

Fyri kunningarráðgeva okkara í barsilsfarloyvi verður søkt eftir avloysara til tíðarskeiðið 1. mai 2008 og eitt ár fram.

**Arbeiðsuppgávur**
Starvið fevnir í høvuðsheitum um, í samstarvi við stjóran og leiðsluna og umvegis ymiskar miðlar, at skapa opinleika og vitan um dagliga virksemi hjá Landsverki, soleiðis at fólk fáa møguleikan at fylgja við og samstundis fáa eina greiða mynd av Landsverki.

Kunningarráðgevin arbeiðir somuleiðis fyri einum „konstruktivum" samstarvi við fjølmiðlarnar og syrgir fyri, at Landsverk altíð er til reiðar at veita fjølmiðlunum teir upplýsingar og tað tilfar, teimum tørvar.

At enda er kunningarráðgevin ein tænastuveitari til allar deildir hjá Landsverki, t.d. tá ið kunnandi tilfar skal framleiðast í sambandi við framløgur, ráðstevnur, lýsingarátøk o.a. Kunningarráðgevin tryggjar, at alt kunnandi tilfar frá Landsverki er umboðandi fyri stovnin - bæði í formi og innihaldi.

Talan er um eitt starv við spennandi avbjóðingum, og sum gevur góðar møguleikar fyri persónligari og fakligari menning.

Kunningarráðgevin vísir beinleiðis til stjóran.

**Førleikakrøv**
Umsøkjari skal hava viðkomandi útbúgving og royndir, helst innan omanfyri nevndu øki, og duga væl at málbera seg skrivliga, serliga á føroyskum.

Tað er umráðandi, at tann, ið settur verður, hevur góð samstarvsevni, hugflog, dugir at arbeiða miðvíst, sjálvstøðugt og ábyrgdarfult og er til reiðar at royna nýggjar avbjóðingar, um tað skal verða. Góður kt-kunnleiki er ein treyt.

**Setanartreytir**
Løn og setanartreytir annars vera sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag.

**Umsóknir**
Umsóknir við prógvum og lívsgongdarlýsing (cv) verða at senda til lv@lv.fo ella til:

Landsverk,
Postsmoga 78,
110 Tórshavn,

og skulu verða okkum í hendi í seinasta lagi 25. mars. Merkið umsóknina „Kunningarfólk", og viðmerk í umsóknini, hvar tú hevur sæð lýsingina.

Fleiri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Oyvind Brimnes, stjóra, á fartel. 540 801 ella ob@lv.fo

Landsverk, Tinghúsvegur 5, Postsmoga 78, Tórshavn, | Tel 340 800, Faks 340 801, lv@lv.fo, www.landsverk.fo

LANDSVERK *byggir land*

*Landsverk er stovnur undir Vinnumálaráðnum og hevur um hendi vega-, byggi- og havnamyndugleikauppgávur. Stovnurin ráðleggur og ger ætlanir, útinnir, rekur og viðlíkaheldur landsvegir, havnir, bygningar og tyrlupallar.*





Nes kommuna nes@nes.fo · www.nes.fo

ENDURLÝSING:

# Havnameistari til Tofta Havn

## Nes kommuna søkir eftir havnameistara at byrja 1. apríl 2008, ella skjótast tilber.

Tofta havn er í menning og harvið eitt spennandi arbeiðspláss. Havnin hevur 1100 vitjanir árliga av førum størri enn 50t. Harafturat vitja 5500 bátar og smærri deksfør í havnini.

**Ábyrgdarøkið**
Havnameistarin kemur at hava ábyrgd av havnalagnum í tøttum samstarvi við onnur starvsfólk hjá kommununi og undir yvirskipaðari ábyrgd bygdaráðsins/ tekniska nevnd. Vaktarskipanin verður samskipað við aðrar fakbólkar í kommununi.

**Førleikakrøv**
- Viðkomandi nautiska útbúgving
- Góðar málsligar førleikar, bæði í skrift og talu, í føroyskum, norðurlendskum og enskum
- Teldukunnleiki
- Persónligar eginleikar, sum m. a. at vísa samstarvsvilja og myndugleika

**Setanarviðurskifti**
Starvið verður sett eftir sáttmála millum Skipara- og Navigatørfelagið og Kommunala arbeiðsgevarafelagið. Harafturat verður veitt ein føst viðbót fyri vaktir. Nærri upplýsingar fáast við at ringja til borgarstjóran á tel 565000.

**Umsóknir**
Umsóknir, sum kunna um útbúgving, royndir og møgulig viðmæli, skulu sendast til:

Nes kommunu, Toftavegur 3
FO-650 Toftir.

Umsóknarfreistin er mánadagin 17. mars 2008, kl. 12.00.

Nes kommuna tilskilar sær rætt til frítt at velja millum innkomnar umsóknir, ella onga at taka.

KREA



# Studio Pegasus

- ein kreativur orkudepil








- Ljóð- og videolýsingar
- Videoupptøkur og redigering
- Tónleika/fløgu-upptøkur



STUDIO PEGASUS tlf 456500